# Bygdirnar útbyggjast fyrst

**Tíðin er ikki búgvin til samanlegging av øllum kommunum í Vágum, heldur borgarstjórin í Miðvági, sum setti atkvøðumet á valinum týsdagin. Skilabest er at útbyggja bygdirna fyrst, sigur hann**

KOMMUNUVAL
*Edvard Joensen*



*Borgarstjróin í Miðvági, Jóan Pauli Frederiksen, hevði metval týsdagin. Eingin kommunalpolitikari í Miðvági hevur nakrantíð fingið 114 persónligar atkvøður á einum kommunuvali*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Miðvági:**
Tað, sum skal gerast í bygdunum, má fáast frá hondini fyrst, áðrenn farið verður at tosa um kommunusamanlegging, sigur Jóan Pauli Frederiksen, borgarstjóri í Miðvági.

Hann grundar støðu sína á, at verður fyrst lagt saman, kann tað skjótt enda við óneyðugum tvídrátti í einum stórum kommunustýri um, hvar pengar til hetta ella hatta skulu brúkast.

– Lat okkum heldur fáa frá hondini tað, sum neyðugt er at byggja út og gera liðugt í teimum einstøku bygdunum, áðrenn vit fara at tosa um samanlegging, sigur Jóan Pauli Frederiksen.

Hann heldur tað vea skilabetri við breiðum samstarvi millum kommunur enn við beinleiðis samanlegging.

– Tað er keðiligt at blanda smátingini saman. Vit eiga heldur at halda okkum til at samstarva um tey stóru málini so sum ellisheim og skúla, sigur Joan Pauli Frederiksen. At fara at sita í einum stórum kommunustýri og skula gera av, hvar pengar til nakar metrar av kloakk ella vegi skulu brúkast, kann skjótt føra til óneyðugt kegl. Tí er betri at fáa alt tað avgreitt, áðrenn vit fara at tosa um at gera alla oynna til eina kommunu.

Um Felagskommununa sigur Jóan Pauli Frederiksen, at hon kann útbyggjast og brúkast sum ein stovnur, ið til dømis kann umsita barnaverndarmál og eldraøkið, sum skjótt fara at verða løgd út til kommunurnar.

Felagskommunan hevur ongar politiskar heimildir sum so, men er ein umsitingarstovnur. Endaligu avgerðirnar verða og fara framhaldandi at verða tiknar í teimum ymsum bygdarráðunum, sigur hann.

Jóan Pauli Frederiksen, borgarstjóri í Miðvági hevði metval týsdagin. Hann fekk 114 persónligar atkvøður, og tað hevur eingin fingið á kommunuvali í Miðvági fyrr.

Hann sigur, at enn hevur hann ikki tikið stig til at kalla nývalda bygdarráðið saman. Tað væntar hann, at hann fer at gera ein av fyrstu døgunum.

Jóan Pauli Frederiksen sigur, at hann heldur tað vera frægast, at listarnir arbeiða saman og býta nevndarsessir millum sín heldur enn at gera samgongur.

Um orsøkina til tær nógvu persónligu atkvøðurnar sigur Jóan Pauli Frederiksen, at hann metir tað vera arbeiðið, sum gjørt er i Miðvági seinasta valskeiðið, sum nú sæst aftur.

Og tí, sum gjørt er, hava tey sjálv staðið fyri uttan at hava keypt serfrøðingarhjálp uttaneftir, vísir hann á. Soleiðis hevur kommunan spart nógvar pengar, og tað løna veljararnir nú aftur.

Men hóast nógv er gjørt, er kortini nógv eftir. Fleiri vegir frá áttatíárunum liggja enn hálvlidnir og mangla asfaltering, kantar og tílíkt. Og bygdarskúlin er ikki nóg væl fyri. Hølisviðurskiftini eru ikki nøktandi, og tað verður tað nú gjørt nakað við.

Tá skúlin í síni tíð varð bygdur, var pláss gjørt til ein svimjihyl. Kommunan fer nú undir at leggja dekk í svimjihøllina og gera skúlastovur. Eina vanliga skúlastovu og so nakrar serstovur, soleiðis sum skúlalógin fyriskrivar, greiðir Jóan Pauli Frederiksen, borgarstjóri í Miðvági, frá.

# Ítróttaráhugin ger mun

**At ein miðvingur, sum er búsitandi í Bø, fær flestar persónligar atkvøðu til kommunuval í Sørvági, man koma av, at hann er áhugaður í ítróttinum í bygdini, heldur toppskorarin á kommunuvalinum, Jógvan Páll Joensen. Tað telur ivaleyst eisini við, at hann alment hevur sagt seg at vera fyri kommunusamanlegging, metir hann**

KOMUNUVAL
*Edvard Joensen*

– Hetta kom rættiliga óvæntað, og eg havi ikki rættiliga fingið hugsað um hetta enn. Men tað kennist væl, sigur Jógvan Páll Joensen í Bø, sum fekk flestar persónligar atkvøður á kommunuvalinum í Sørvágs Kommunu týsdagin.

Tað hevur ivaleyst talt við, tá sørvingar hava sett kross á kommunuvalinum týsdagin, at fyrrverandi borgarstjórin í Bø hevur víst áhuga fyri ítróttinum í Sørvági. Jógvan Páll Joensen, borgarstjóri í Bíggjar Kommunu, hevði flestar persónligar atkvøður, tá talt varð upp í Sørvági týskvøldið. 100 vóru tær í tali.

– Tað er ivaleyst eisini annað, sum fólk hava havt í huganum, tá tey hava valt meg, sigur Jógvan Páll Joensen. Hann sipar til royndirnar sum borgarstjóri í Bíggjar Sóknar Kommunu, sum nú verður løgd saman við Sørvágs Kommunu.

Hóast talan var um eina lítla kommunu, er tó ymiskt, sum kann brúkast aftur í eisni størri kommunu, sigur hann.

Og ikki minst tað, at hann hevur gingið inn fyri samanlegging, metir hann hava havt sína ávirkan eisini.

– Fólk síggja tað positiva í eini samanlegging, og tey hava tí helst valt ein persón, sum ikki dylur fyri, at hann er fyri framhaldandi at arbeiða við smanlegging, er hansara meting.

Hann heldur, at nú vestari partur av oynni saman við Mykinesi er vorðin ein kommuna, er tíð at fara at tosa um at leggja alla oynna saman í eina stóra kommunu.

– Men hetta er ein tilgongd, ið krevur nogva tíð. Og farast má spakuliga og skilagott avstað í so stórum máli, sigur Jógvan Páll Joensen, bygdarráðslimur í Sørvágs Kommunu.

Hann er greiður yvir, at tað er ikki bara í Sørvági, hann hevur fingið allar hesar mongu atkvøðurnar. Í Bø fekk hann nógvar. Hann var einasta valevnið úr Bø yvirhøvur. Eisini í Gásadali og Mykinesi var onkur atkvøða í hansara part. Men reiðiliga nógvar eru komnar í Sørvági eisini. Meira enn helvtin heldur hann seg vita.

Hóast Jógvan Páll Joensen fekk flestar persónliga atkvøður, er hann ikki fyrst valdi bygdarráðslimurin kortini. Ein annars listi enn tann, Jógvan Páll varð valdur á, fekk fleiri atkvøður, og tí áliggur tí, sum fekk flestar atkvøður á tí listanum, at kalla nýggja bygdarráðið saman.

Jógvan Páll Joensen sigur tó, at hann ikki frammanundan fer at siga nei takk til ein borgarstjórasess í Sørvági. Tað skilst á honum, at fær hann tilboðið, er hann sinnaður at taka av.

Av politiskum málum, hann ætla sær at arbeiða við, er umframt størri samtarv millum kommunurnar í oynni, eisini útbygging av havnarlagnum í Sørvági, og ikki minst av ídnaðarøkinum við flogvøllin.

– Kunnu vit so onkursvegna fáa ávirkað eina útbygging av sjálvum flogvøllinum, hevði tð verið gott sigur Jógvan Páll Joensen.



*Jógvan Páll Joensen fekk flestar persónligar atkvøður á kommunuvalinum í Sørvági. Hann ber seg ikki undan, um heitt verður á hann um at gerast borgarstjóri*
*Mynd: Edvard Joensen*





*Høvuðskandidatarnir til borgarstjórastarvið í Klaksvík eru Steinbjørn O. Jacobsen úr Tjóðveldisflokkinum, Eyðgunn Samuelsen úr Javnaðarflokkinum og Jákup Mikkelsen úr Fólkaflokkinum*

# Alt er púra opið í Klaksvík

**Flokkarnir í meirilutanum í Klaksvík fundaðust mikukvøldið, men teir komu ongan veg. Ein av teimum royndu politikarunum saknar aðrar royndar politikarar, og samansetingin av persónum kann fáa avgerandi ávirkan í samráðingunum**

SAMRÁÐINGAR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Býráðspolitikarar í Klaksvík er mest sum samdir um, at alt er púra opið í samráðingunum um samgongu fyri næstu fýra árini.

Eftir valið tóktist mest upplagdi møguleikin vera, at tann meirilutin, sum hevur stýrt seinastu fýra árini, heldur fram.

Tjóðveldisflokkurin, Javnaðarflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin varðveittu meirilutan í býráðnum, og tað eru eisini hesir flokkar, sum eru farnir undir at samráðast um framhaldandi starv.

Eftir valið týskvøldið hittust flokkarnir fyri at gera ein avtalu um, at teir fóru at samráðast, áðrenn aðrir møguleikar vórðu viðgjørdar, men samstundis stendur størsti flokkurin í býráðnum – Fólkaflokkurin – uttan fyri hurðina og vil sleppa inn í hitan.

## Bara innleiðandi prát

Fyrsti fundurin millum Tjóðveldisflokkin, Javnaðarflokkin og Sjálvstýrisflokkin var á Sjómansheiminum í Klaksvík mikukvøldið.

Tosað varð aftur og fram um ymisk mál, men einki ítøkiligt spurdist burtur úr fundinum. Torleif Sigurðsson, sum umboðar Javnaðarflokkinum og er varaborgarstjóri, var tann, sum mælti til at slíta fundin og hittast aftur hóskvøldið.

– Tað er eingin orsøk at leypa fram av, vit skulu brúka tað tíðina, sum er neyðug, tí tað er nóg mikið av tíð til at samráðast í, sigur Torleif Sigurðsson.

– Flokkarnir hava avtalað at samráðast víðari, og ta avtaluna fara vit at halda. Vit skulu ikki hava somu tilstandir sum í Havn, sigur hann.

## Hvør skal vera borgarstjóri

Eitt av sentralu málunum í samgongusamráðingunum er, hvør skal vera borgarstjóri í Klaksvík næstu fýra árini.

Steinbjørn O. Jacobsen úr Tjóðveldisflokkinum hevur sitið í hesum sessi seinastu tvey árini, og hann fekk eitt ordans herðaklapp frá veljarunum, sum góvu honum slakar 400 atkvøður – hetta er tað mesta persónliga atkvøðutalið í Klaksvík nakrantíð.

Tí er Tjóðveldisflokkurin avgjørdur um, at hann skal hava borgarstjóran næstu fýra árini.

Eyðgunn Samuelsen úr Javnaðarflokkinum hevði eisini eitt sera gott val og fór upp um tær 200 atkvøðurnar, og hon hevur eisini sagt seg verða sinnaða at gerast borgarstjóri í einum nýggjum meiriluta. Men hvussu avgerandi hetta er fyri Javnaðarflokkin, og um talan fyrst og fremst er um taktiskt spæl fyri at fáa sum mest av ávirkan, er ilt at avgera í løtuni.

Harafturat stendur Fólkaflokkurin í skugganum og vil sleppa fram at – bæði í meirilutanum og í borgarstjórasessinum.

## Spurningur um persónar

Politikkur snýr seg nógv um persónar, og hvønn hvør helst vil samstarva við. Torleif Sigurðsson fjalir ikki út yvir, at hann saknar tveir av teimum royndu politikarunum, sum ikki halda fram í býráðnum.

– Hilmar Danielsen og Karl Heri Joensen hava prógvað, at teir eru stabilir politikarar, og tað er ein missur fyri býráðið, at teir ikki halda fram, sigur Torleif Sigurðsson.

Hilmar Danielsen stillaði ikki uppaftur á valinum hesaferð, meðan Karl Heri Joensen ikki var afturvaldur.

Torleif Sigurðsson heldur, at meirilutin má finna út av, um flokkarnir eru førir fyri at taka byrðina hjá undanfarna meiriluta á sínar herðar, og um samansetingin av teimum royndu og yngru politikarunum kann bera til.

– Í løtuni er alt púra opið. Tað er møguligt, at meirilutin heldur fram, men aðrir møguleikar eru eisini. Fyrst fara vit tó at samráðast í verðandi meiriluta, sigur Torleif Sigurðsson.

Hóskvøldið skuldi nýggjur fundur vera millum Tjóðveldisflokkin, Javnaðarflokkin og Sjálvstýrisflokkin.

## Tær staðbundnu mannaðar

Á kommunuvalinum týsdagin skuldu fólk í Árnafirði, Mikladali og á Trøllanesi velja fólk í staðbudnu nevndina fyri bygdirnar.

Í Árnfirði komu Tórmóður M. Árnatón, Niclas F. Justinussen og Jóna S. Joensen í nevndina.

Í Mikladali er manningin Danial Eliasen, Jógvan A. Sørensen og Christian Andreasen.

Og á Trøllanesi eru fólkini í staðbundnu nevndini Eyðun Eliassen, Mikkjal Joensen og Maud Østerø.

## Fyrstvaldu taka av

Sosialurin hevur tosað við tveir av teimum fyrstvaldu í tveimum bygdarráðum í Norðoyggjum. Teirra uppgáva er at kalla inn til fundar at skipa bygdarráðini. Í Hvannasundi sigur sitandi borgarstjórin, Júst Poulsen, at hann ætlar at fáa tann fundin í lag sum skjótast.

– Vit plaga at bíða til jóla, men eg dugi ikki at síggja, at tað skal vera nakað at bíða við, sigur Júst Poulsen, sum hevði tikið av, um borgarstjórasessurin stendur honum í boði aftur. Hann hevur sitið í bygdarráðnum í 12 ár – harav tey fýra sum borgarstjóri.

Í Svínoyar kommunu varð Eyðun Jacobsen fyrstvaldur. Eyðun Jacobsen, sigur, at hann fer at bíða við at kalla inn til tað líður longur móti jólum.

– Vit eru trý í bygdarráðnum, so vit atkvøða um, hvør skal hava borgarstjóra-sessin. Men eg taki av tilboðnum, um eg fái tað, sigur Eyðun Jacobsen av Svínoynni.

Hann fekk bjóðað sessin sum borgarstjóri seinast, men hann tók ikki av. Pól Sundsskarð hevur sitið sum borgarstjóri á Svínoynni seinastu fýra árini, men hann stillaði ikki uppaftur.

**- sae -**

# Tórur vildi ikki skifta part

**Tað endaðist ikki minnilutan í bygdaráðnum á Sandi at koppa javnvágini við at bjóða borgarstjórastarvið til ein av teimum á meirilutalistanum**

KOMMUNVAL
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

**Sandur:** Valstríðið á Sandi var lívligt, og teir báðir listarnir, sum vóru stillaðir upp, gjørdu nógv fyri at fáa meirilutan.

Listi C við borgarstjóranum Páll á Reynatúgvu á listanum vann meirilutan við sløkum 20 atkvøðum fleiri enn listi A, har Jógvan Krog Mortensen var toppskorari.

Úrslitið hevði við sær, at listin hjá borgarstjóranum fekk fýra limir í bygdaráðið og varðveitti harvið sín meiriluta.

Men minnilutin royndi eftir valið at koppa javnvágini við at bjóða Tórur Johannesen á meirilutalistanum borgarstjórastarvið. Tórur Johannesen var bæði hesaferð og seinast næstvaldur á lista C, og honum stóð eftir valið hesaferð í boði at gerast borgarstjóri, um hann vildi fara av lista C og kom í part við lista A.

Hetta vil Tórur Johannesen ikki, og seinni hósdagin skuldu tey á lista C tosa saman um næstu fýra árini.